# Lagnudagurin undir Knúki

SUNNUDAGIN ERU LIÐIN **40 ÁR**, SÍÐANI FLOGVANLUKKUNA Í MYKINESI , IÐ KRAVDI ÁTTA **MANNALÍV**. ØLL, IÐ SLUPPU UNDAN VANLUKKUNI VIÐ LÍVINUM, VÓRU FRAMVEGIS Á LÍVI 30 ÁR EFTIR **VANLUKKUNA**, TÁ GRÆKARIS MAGNUSSEN GAV ÚT BÓKINA **»SOS KNÚKUR«**, OG FLESTU LIVA ENN Í DAG, HÓAST ONKUR ER FARIN



**FLOGVANLUKKA**

Leo Poulsen
leo@sosialurikn.fo

Tað høvdu verið vánalig floglíkindi í fleiri dagar, tá boð endiliga komu til flogskiparan, Bjarna Jensson, um, at nú var væntandi lendandi í Vágum.

Fokker F27 flogfarið hjá Icelandair stóð tá í Bergen og bíðaði eftir flog-líkindum í Vágum, og har var savnað saman fólk úr ymsum ættum, ið skuldu heim til Føroya.

Onkur var komin úr Danmark, onkur úr Íslandi og onkur var í Noregi, men øll skuldu tey til Føroya.

Tey 30 ferðafólkini búðu á Hotel Orion í Bergen, og styttu sær um stundir við at spáka runt í býnum. Um kvøldarnar spældi onkur kort, meðan onkur annar fór í biograf.

Árla á morgni 26. september 1970 fóru so ferðafólk og manning út í flogfarið, og kósin varð sett móti Føroyum.

Veðrið skifti alla tíðina. Stundum var so klárt, at lendandi var, stundum greytatjúkt. Flogfarið sveimaði yvir oyggjunum og gjørdi so eina roynd at lenda. Hendan var kortini avbrotin, og fólk sluppu aftur at roykja, tó at »fasten seatbelt«-skiltið framvegis lýsti.

Hvat síðani hendi ber ikki til at fáa greiði á, men avleiðingarnar vóru álvarsamar.

Eingin endalig frágreiðing er nakrantíð gjørd um vanlukkuna, og flogfarið hevði fingið undantaksloyvi at flúgva við ongum svørtum kassa.

Flogskiparin misti lívið í vanlukkuni, og stýrimaðurin fekk heilaskjálvta og minnist einki frá tí teir fóru úr Bergen til hann var komin úr flogfarinum.

Prógvini vísa tó, at flogfarið rendi á, og at flogskiparin beint áðrenn stoytin varnaðist, at teir vóru alt ov lágt. Hann royndi at seta ferð á flogfarið og at venda nøsina upp eftir, so teir sluppu leysir av vøllinum, men hetta hendi ov seint til at fáa flogfarið upp frá.

Meðan flogfarið fer skoytandi eftir vøllinum rakar tað onkran stóran stein á vegnum og fer í trý. Øll, sum sita har, ið flogfarið brotnar, detta úr og tey flestu doyggja. Tilsamans átta av teimum í alt 34 fólkunum umborð missa lívið, meðan heili 26 sleppa undan.

Óvist var, hvar flogfarið var dottið niður, og upprunaliga bað sýslumaðurin í Vágum, Hjalgrim Magnussen, fólk fara at leita á Vágoynni og í Mykinesi, eins og hann heitti á bátar um at fara á leita á sjónum.

Tá tveir av monnunum úr flogfarinum funnu vegin fram til bygdina í Mykinesi kundu teir greiða staðkendum monnum frá, hvar flogfarið lá, og teir kendu staðið aftur. Stór bjargingarlið fóru úr Sørvági, eins og Hvidbjørnen kom á staðið.

Tað eydnaðist at fáa øll tey 26 yvirlivandi ferðafólkini og manning oman í bygdina í øllum góðum. Eingin doyði út yvir tey átta, sum doyðu á staðnum.

Tað má sigast at vera eitt stórt bragd, at fáa øll tey 26 til høldar, summi teirra ógvuliga illa skadd. Veðrið var vánaligt við kavaslettingi og vindi og mjørka. Bert fáar børur vóru og fleiri av teimum illa skaddu vórðu borin oman í bygdina í netum. Gangið var vánaligt, og ofta duttu menn við teimum skaddu, men alt spældi kortini so væl av, sum tað nú einaferð kundi vónast.

Og sunnudagin kunnu tey øll saman við avvarðandi og Føroya fólki í síni heild markera 40 ára dagin fyri flogvanlukkuni í Mykinesi

Kelda: SOS Knúkur.




*Her sæst, hvar í flogfarinum ymisku fólkini sótu, tá vanlukkan hendi*
*Tekning: Magnus Magnussen*

**Tey vóru við lagnutúrin:**

***Tey, ið mistu lívið***

Bjarni Jensson, flogskipari, 44 ár, Reykjavík
Gunleif Durhuus, skipari, 35 ár, Klaksvík
Brynleif Hansen, trúboðari, 33 ár, Vatnsoyrar
Martin Holm, rektari, 60 ár, Tórshavn
Sofus Jacobsen, rørleggjari, 52 ár, Klaksvík
Hans Jacob Joensen, pylsumakari, 50 ár, Klaksvík
Ernst Petersen, umboðsmaður, 52 ár, Froðba
Davilda Petersen, handilskvinna, 56 ár, Vestmanna

***Tey, ið komu undan við lívinum***

Hans Petur Petersen, Vestmanna
Oluffa Durhuus, Klaksvík
Torbjørn Hjelm, Klaksvík
Gundor Andreassen, Skála
Regin Nesstein, Haldórsvík
Poul Grunnveit, Haldórsvík
Niels Holm, Sæby
Vera holm, Sæby
Bergljót Mørk, Danmark
Astrid Forsberg-Madsen, Keypmannahavn
Jákup Martin Jacobsen, Syrðugøtu
Ólavur Jacobsen, Norðragøtu
Torjørn Mikkelsen, Tórshavn
Eyðbjørg Mikkelsen, Tórshavn
Frynhild Johannesen, Tórshavn
Dánjal J. Bærentsen, Tórshavn
Knút Olsen, Tórshavn
Erhard Næs, Tórshavn
Eyðfinn Poulsen, Tórshavn
Jógvan Asbjørn Skaale, Tórshavn
Torleif Simonsen, Sandavági
Agnar Samuelsson, íslendingur, Danmark
Oddgeir Jensson, Ísland
Páll Stefansson, stýrimaður, Ísland
Hrafnhildur Ólafsdóttir, flogterna, Ísland
Valgerður Jónsdóttir, flogterna, Ísland